# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Jákupi Nielsen úr Vestmanna** fer úr kappellinum á Landssjúkrahúsinum kl. 18. mánakvøldið. Jarðarferðin verður týsdagin kl. 14. Tey ið vilja lata blómur ella krans, kunnu ístaðin lata eina peningagávu til Vestmanna Kirkju. Konta í peningastovnunum.

**Kristianna Kjærbo**, ættað úr Sumba, búsitandi í Havn, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin, 57 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum, mánakvøldið kl. 20. Jarðarferðin verður úr Ebenezer, týsdagin kl. 14. Tey, sum ynskja at minnast Kristionnu, kunnu lata eina gávu til Zarepta. Konta í peningastovnunum.

Fríggjadagin 1. mai andaðist **Erik Lund Eriksen, úr Havn**, 64 ára gamal.

**Bruno Antonisen, Herslev í Danmark**, andaðist í gjár, 1.mai, 69 ára gamal. Jarðarferðin, sum verður úr Filadelfia í Gøtu, verður lýst seinni.

# Martin Hammer farin

Løgið samanfall. Fyrstu ferð eg var saman við Martini og kom at kenna hann, var fyri meira enn tríati árum síðani úti á Kirkju í Fugloy, har vit høvdu møti. Sálomon Joensen var um tað mundið prestur á Viðareiði, og prædikaði hann hendan dagin í kirkjuni á Kirkju. Meg minnist so væl, at prædikuteksturin var Jóhannes evangelium kp. 16.16-24: "Um lítla stund, og tit síggja meg ikki longur, og aftur um lítla stund, tá skulu tit síggja meg ..."

Seinasta sunnudag fylgdi eg Martini til hansara seinasta hvíldarstað, og í kirkjuni var prædikuteksturin hin sami sum úti á Kirkju: "Um lítla stund, og tit síggja meg ikki longur, ..."

Vónin um ævinleikan, sum liggur í hesum teksti, var eisini ein undirtóni í øllum talum, sum Martin helt. Hann talaði títt um tey, sum trúføst høvdu gingið vegin, og sum nú eru heima í teimum ævigu búðstøðum. Minnist serliga, tá ið hann plagdi sessast við urguna og sang norska sangin við niðurlagnum

*De venter, de venter i himmelens stad,*
*de venter, de venter bag portenes rad*
*ja, hjemgangde venner og englenes tal,*
*de venter på mig i den himmelske hall.*

Martin var føddur á Tvøroyri í 1930. Han starvaðist nøkur ár í Havn sum slaktari hjá Otto Reinart. Eisini hevur hann verið til skips og eitt skifti læraravikarur. Martin var bæði á Haslev háskúla og Børkop bibliuskúla. Í 1962 giftist hann við Danu Hansen á Nesi, tey fingu seks børn, eitt teirra doyði pinkulítið.

Hansara lívsstarv má tó sigast vera trúboðaragerningurin. Virkisøki hansara í Indre Missión var Norðoyggjar frá 1972 til 78 og síðani í Suðuroynni inntil hann fór frá sum løntur meðarbeiðari í 1989. Men fyri tað helt hann fram at gera trúboðaragerning. Sera virkin var hann á hesum øki. Við stórari frímóð og við trúfesti vitjaði hann bygdir kring landið at hava møtir – og ikki minst gjørdi hann nógv burtur úr at hyggja inn á gólvið hjá fólki. Hann hevði fingið fatur í, hvat ein trúboðaragerningur er, tí legði hann seg ikki eftir bara at koma har, sum nógv fólk kom saman, nei, hann gjørdi ongan mun á smærri og størri bygdum, kundi hava missiónsviku á plássum, hvar tað bara vóru 2-3 hús og har hvørki var kirkja ella missiónshús; eitt nú norðuri í Múla og á Hamri í Froðba, sum neyvan nakar annar hevði gjørt. Tá hevði hann møtini annaðhvørt í skúlanum ella í stovuni í húsunum, har hann búði.



Sum starvsfelagar høvdu Martin eg eg tætt samband við hvønn annan, tosaðu ofta saman í telefon og ferðaðust saman til møtir. Ofta ynskti eg mær, at hava ein part av tí frímóð, sum hann hevði. Martin og Dana vóru altíð sera blíð at koma til. Ofta havi eg verið til hús hjá teimum, bæði á Selheyggi, á Nesi og ikki minst á Tvøroyri.

Martin talaði ofta um ta royndu trúnna, at her í lívinum sleppa vit ikki undan at fara gjøgnum trongdir og tað svára, eisini at sjúka er ein partur av tí, sum lagt verður á okkum. Sjálvur slapp hann heldur ikki undan. Á eini ferð saman við konu síni í Svøríki, har tey vitjaðu dóttir teirra, varð hann brádliga hart raktur av sjúku, sum gjørdi, at hann hvørki kundi tosa ella ganga longur. Tað gjørdi mær sera ilt at síggja hann hava tað so, hann, sum altíð so kvikliga rann bæði úti og inni, og so við eitt gerast óhjálpin og ikki longur kunna tosa. Tað mundi eisini kennast honum sjálvum svárt, at skula sita í átta ár, og ikki kunna luttaka í einari samrøðu. Kortini var hann smílandi tær ferðir eg vitjaði hann, og tá ið eg minti hann á okkurt, vit høvdu havt saman gjøgnum tíðina. Martin var lættur av lyndi og skemtingarsamur, og tú keddi teg ikki, at vera saman við honum.

Nú hevur hann so fingið frið og er fluttur yvir um til teirra, hann ofta talaði um. Men best av øllum, at hann til hin stóra uppreisnardag, nú kann hvílir í hondum hansara, ið hann her á foldum setti sína trúgv á.

Hin alvaldi troysti teg, Dana, og familju tína, og styrki tykkum í døgunum, sum koma

Friður veri við minninum um vin og starvsfelag mín, Martin Hammer, trúboðara

**John**

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Erik Lund Eriksen**

andaðist fríggjadagin 1. mai, 64 ára gamal.
Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum
týsdagin kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Gunnvør, Høgni, Maiken og Sverri við familjum**

Tey, ið vilja minnast Erik, kunnu ístaðin lata eina gávu til
frítíðararbeiðið í Ebenezer, konta í Eik.

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu okkum
samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma,
langomma og olduromma okkara

**Alice Joensen**

andaðist og varð jarðað.
Takk fyri blómur og kransar. Takk fyri peningagávu
til ungdómsdeildina hjá B36.
Takk fyri hjálp til jarðarferðina og ervið.
Takk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara
seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Gunvi, Daniel og Margit**

**Tøkk**

Vit takka øllum teimum, ið sýndu samkenslu og
hjálptu, tá okkara góða mamma, vermamma,
omma og langomma

**Hanna Absalonsen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðað.
Tøkk fyri vøkur orð í kapellinum, í Betesda
og á grøvini.
Tøkk fyri blómur, kransar og gávur til Akurin.
Tøkk til tey, ið hjálptu til jarðarferðina og fylgdu
henni til seinasta hvíldarstað.
Tøkk til starvsfólk á Norðoya Ellis-og Vistarheimi, ið
góvu henni umsorgan.

*Vegna familjuna*
**Mikkjal, Elmar og Anna**

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan
hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri
sonur, drongur, pápi, beiggi og svágur

**Jógvan Páll Egholm**

so brádliga bleiv tikin frá okkum.

Tøkk til Jógvan Fríðriksson, bisp, fyri troystarrík orð
heima og til jarðarferðina.
Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og gravarar.
Tøkk til tykkum, sum vóru so vinarlig at taka
tykkum av ervinum.
Tøkk fyri blómur og kransar og til tykkum øll, sum
fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Foreldur, genta, børn og systkin við familju**